# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Martin Gaard 70 ár



Í dag, mánadagin 14. november, verður Martin Gaard, ættaður úr Klaksvík og búsitandi í Emdrup í Keypmannahavn, 70 ár. Martin er statsgóðkendur grannskoðari, og í Føroyum er hann millum annað kendur fyri at hava verið grannskoðari í Norðoya Sparikassa seinastu knapp-liga 30 árini.

Foreldrini hjá Martini vóru Jenny, fødd Nielsen og ættað úr Vatnsoyrum, og Jóhannes Gaard, sum var ættaður Frammi úr Garði í Svínoy. Tey búðu í Víkunum í Klaksvík, og tey áttu tveir synir. Ólav sum var føddur í 1934 og sum var kommunulækni í Klaksvík, inntil hann doyði í oktober 1995, og so Martin, sum var føddur 14. november 1935.

Martin gekk í millum- og realskúla í Klaksvík. Í 1952 fór hann í starv í Norðoya Sparikassa. Har var hann í trý ár, og síðani fór hann á Niels Brock handilsskúlan í Keypmannahavn, har hann leyk HH prógv.

Nú verða kanska í hundrað tali av føroyskum ungdómum klæktir við hesi útbúgvingini á hvørjum sumri. Fyri hálvari øld síðani var hetta ikki so vanligt. Onkur vil vera við, at Svend Krosstein var fyrsti klaksvíkingurin, sum leyk HH prógv í Keypmannahavn, og at honum á baki komu Martin Gaard, Trygvi Johansen, Líggjas í Bø, Henning Jensen, Jónbert Poulsen og Finn Kjølbro.

Málið hjá Martini var at gerast ríkisgóðkendur grannskoðari. Leiðin var um kvøldarnar at fara undir HD lestur og samstundis at arbeiða hjá grannskoðara. Martin var í 16 ár hjá C. Jespersen, sum nú eita KPMG.

Seinni fór Martin undir egið grannskoðaravirki saman við einum dana. Virkið nevndist Ragborg & Gaard. Teir hildu til í hølum í Nørre Farimarsgade yvirav H. C. Ørsted parkini. Seinni fluttu teir í egin høli úti á Frederiksberg.

Tá ið felagin gjørdist sjúkur og doyði, varð virkið selt til grannskoðaravirkið Coopers & Lybrand, sum seinni fusioneraði við Price Water House. Martin Gaard arbeiddi síðani hjá hesum virkjunum.

Martin gjørdist grannskoðari í Norðoya Sparikassa í 1976, og hesa uppgávuna hevur hann røkt síðani. Í hesum tíðarskeiðnum hevur sparikassin ment seg ógvuliga nógv, og sjálvandi hevur sparikassin notið gott av hollari ráðgeving frá Martini Gaard. Tey, sum hava við Martin at gera, lýsa hann at vera fakliga dugnaligan, og við sínum sáttliga, fyrikomandi og lítið lætna verumáta er hann væl umtóktur.

Heimbýurin man hava havt stórt álit á Martini. Tað sæst millum annað aftur í, at hann hevur havt fleiri onnur álitisstørv. Eitt nú hevur hann verið grannskoðari hjá Tekniska skúla í Klaksvík í mong ár.

Hóast hann hevur búð á flatlondum største partin av lívinum, so hevur Martin altíð fylgt væl við í føroyskum samfelagsviðurskiftum. Tí var tað einki at undrast á, at myndugleikarnir valdu hann í eina av nevndunum, sum í sambandi við kreppuna fyrrapartin av níti árunum kom við frágreiðing um, hvussu tað varð mett at vera skilabest at fara fram.

Martin er giftur Kirsten, fødd Piletræ Petersen og ættað úr Nykøbing Falster. Hon hevur eisini HD útbúgving innan roknskap og EDV, og hon hevur arbeitt innan skattaumsiting. Børnini eru Anette, Jóannes, Kristian og Bjarni. Abbabørnini eru ellivu í tali, og eitt er komið afturat í triðja ættarliðnum. Í mong ár búði familjan í Allerød, men seinni fluttu tey inn í Emdrup at búgva. Anetta og Kristian búgva í Emdrup, Jóannes býr á Eysturbrúgv, og Bjarni býr í Allerød.

**RED.**

---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Sofus Andreasen**, ættaður av Strondum, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin 12. november, 65 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Elna Clementsen** úr Skopun, fødd Justinussen í Leirvík, andaðist leygardagin 12. november, 92 ára gomul. Bønarhald verður í kapellinum í Havn í dag klokkan 14.30. Kistan fer á Gomlurætt klokkan 15.45. Jarðarferðin verður úr Skopunar kirkju týsdagin 15. november klokkan 13. Sungið verður úr sálmabókini.

**Isabella Hansen,** Toftir, vanliga nevnd Bella, andaðist á Sambýlinum Vesturskin leygardagin 12. november, 89 ára gomul. Kistan kemur í Nebo á Toftum í kvøld klokkan 18.30. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Hans David Petersen** av Viðareiði, sonur Elsupu og Petur Petersen, andaðist leygardagin 12. november, 23 ára gamal. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

**Sanna Hvidbro**, Klaksvík, ættað av Sandi, andaðist á Norðoya Røktarheimi leygardagin 12. november, 82 ára gomul. Farið verður úr kapellinum týsdagin klokkan 18 heim í Kristianskirkjuna. Jarðarferðin verður úr Kristianskirkjuni mikudagin klokkan 13. Tey, ið vilja minnast Sannu kunnu lata Norðoya Røktarheimi eina gávu. Konta í Norðoya Sparikassa.

**Sofus Olsen**, Sofus á Dalinum, Klaksvík, andaðist leygarmorgunin á Klaksvíkar Sjúkrahúsi, 84 ára gamal. Kistan fer úr kapellinum mánadagin klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Kristianskirkjuni týsdagin klokkan 13.30.

**Bodil Ellendersen,** Tórshavn, andaðist í heiminum fríggjamorgunin, 84 ára gomul. Jarðarferðin verður frá Havnar kirkju týsdagin 15. november klokkan 13.

**Jógvan Hansen**, Gørðum, Vestmanna, vanliga nevndur Vivve, búsitandi í Norra, andaðist 10. november, 73 ára gamal.

---

## Tøkk

Eina hjartans tøkk til tykkum mongu, ið komu í føðingardag mín - bæði her heima og uttanlands frá. Ikki minst tøkk til tykkum, sum stákaðust og gjørdu dagin so hugnaligan. Tøkk fyri gávur, telegrammir og uppringingar. Guð signi tykkum øll.

**Atli Klein Olsen**

---

### Dagurin í morgin

**15. november. Leopold**, deyður í 1136. Greivi í Eysturríki, sum varð skírdur halgimenni fyri mongu góðgerðir sínar og fyri tær kirkjur og kleystur hann læt byggja. Hann umkomst á eini veiðuferð. Navnið kemur av týska orðinum fyri *fólk* og *djarvur*.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at okkara elskaði pápi, verpápi, abbi og bróður

**Sofus Andreasen**
ættaður av Strondum, búsitandi í Havn

andaðist leygardagin 12. november á
Landssjúkrahúsinum 65 ára gamal.

*Jarðarferðin verður lýst seinni.*

*Familjunnar vegna*

**Jan, Svend Arni og Anna Maria**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at elskaða
mamma, omma og langomma okkara

**Ingibjørg M. Johannesen**
Tórshavn

andaðist 13. november, 81 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Ebenezer mikudagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Marjun, Poli, Finn v/ familju**

---

†

Kæra móðir okkara

**Bodil Ellendersen**
Tórshavn

andaðist fríggjamorgunin 11. november,
84 ára gomul.
Jarðarferðin verður týsdagin 15. november
kl. 13.00 úr Havnar kirkju.

*Familjunnar vegna*

**Inga, Eyðun og Systi**